Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
Postboks 1376
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
(+298) 21 13 76
www.blf.fo
blf@blf.fo

*14. november 2019*

# UMMÆLISSKRIV

***viðvíkjandi***

**Uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um um almannapensjónir o.a.**
(Lækking av mótrokning),

**Uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum**
(Hækking av grundupphædd og lækking av frádráttarfríari inntøkuupphædd), og

**Uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)**
(Skattafrádráttur á kr. 6.000 um árið til fólkapensjónistar)

BLF takkar fyri høvið at ummæla uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. (Lækking av mótrokning), uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum (Hækking av grundupphædd og lækking av frádráttarfríari inntøkuupphædd) og uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin) (Skattafrádráttur á kr. 6.000 um árið til fólkapensjónistar).

BLF skal tó samstundis vísa á, at felagið metir tað vera óheppið, at ummælisfreistin er so stutt, og at uppskotini verða send til ummælis samstundis, sum tey verða løgd fram í Løgtinginum.

Hóast hetta hevur BLF hesar viðmerkingar:

BLF mælir til, at inngjaldið til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin (AMEG) verður lækkað við einum hálvum prosenti. Orsøkin er, at tað í viðmerkingunum til uppskotið um áseting og javning av almannaveitingum verður ført fram, at grundupphæddin nú verður hækkað aftur til støðið, hon var á, áðrenn hon varð lækkað í 2016. Í viðmerkingunum verður eisini víst á, at samstundis sum grundupphæddin lækkaði, varð útgjaldið úr AMEG hækkað. Hetta varð gjørt við, at inngjaldið til AMEG varð hækkað við einum hálvum prosenti.

Í øðrum lagi, um AMEG-inngjaldið ikki lækkar, skal BLF mæla til, at uppsparingarkravið í eftirlønarlógini, sum í dag er 12%, verður lækkað til 10%. Í 2018 og 2019 varð AMEG-inngjaldið hækkað við 0.75 prosentum, og samstundis varð uppsparingarkravið í eftirlønarlógini lækkað frá 15% til 12%. Um inngjaldið til AMEG framhaldandi verður 3% og

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
Postboks 1376
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
(+298) 21 13 76
www.blf.fo
blf@blf.fo

grundupphæddin í fólkapensjónini verður hækkað aftur, er umráðandi, at fólk hava møguleika at tillaga sína eginuppsparing samsvarandi.

BLF heitir at enda á politiska myndugleikan um at hava í huga, at ov nógvar broytingar á pensjónsøkinum samanumtikið minka um álitið á skipanina og harvið hugin at spara upp.

**Vinarliga**

**Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya**